# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Føðingar



Tann 27. oktobur fingu Beinta og Andrias eina lítla systur. Hon var 52 cm long og vigaði 3350 gr. Foreldrini eru, Maibritt og Bárður Johannessen.



11. oktobur fingu Bjørk og Bartal eina lítla systir. Hon var 56 cm long og vigaði 4400 gr. Foreldur teirra eru Barbara og Otto Gram.

5. september fingu Bjørg Harryson og Hanni Niclasen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 56cm long og vigaði 3980g.

20. oktobur fingu Mary Ann Mathisen og Bárur Andreasen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3900 gr.

24. okt. fingu Ann-Mari Egholm og Mads Hedegaard Jespersen, Vestmanna, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3300 gr.

27. oktobur fingu Gladys Myrna á Kósini og Eyðun á Kósini, Klaksvík, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3850 gr.

28. oktobur fingu Sóleyg og Jónsvein Poulsen, Vágur, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3420 gr.

28. oktobur fingu Helfrid Poulsen og Helgi S. Ingibjørnsson, Eiði, eina dóttur ið eitur Hanna Bjørk. Hon var 55 cm. long og vigaði 3900 gr.

30. oktobur fingu Marita Olsen og Heri Poulsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 2925 gr.

1. novembur fingu Guðrun og Hans Ove Johansen, Kollafirði, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3300 gr.

---

**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 4. november verur Einar Joensen í Oyndarfirði 80 ár. Dagurin verur hildin saman vi børnum og barnabørnum Millum Gilja 76, 188 Hoyvík.

Sunnudagin 5. novembur fyllir Kaja Jacobsen, á Oyrabø í Vági 80 ár. Tey, ið ynskja at gleða Kaju eru vælkomin í Stóra Pakkhús leygardagin 11. novembur frá kl. 10.00-14.00.

**Av serligum orsøkum**
er føðingardagurin hjá Halgerð Andreasen fluttur til Eyðun Andreasen, Millum Svalir 12.

**Prógv**
Jákup Sverri F. Kass, Tórshavn, hevur lokið próv sum cand. ling.merc í enskum og europavísund á Handilsháskúlanum í Århus.

Ronald Brierley:

# Sandavágur er vakrasta stað í Føroyum

**Ronald Brierley býr í Snaith í Onglandi. Hann kom fyrstu til Føroya sum bretskur hermaður í apríl 1942, var giftur føroyskari konu og búði eina tíð í Sandavági. Hann hevur ferðast umleið 70 ferðir til Føroyar**

FØROYAVINUR



*Sandavágur er vakrasta staðið í Føroyum, sigur Ronald Brierley, sum hevur ferðast umleið 70 ferðir til Føroyar*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Mánadagin 30. oktober fór Ronald Brierley saman við eini dóttur og versoni aftur til Onglands eftir at hava verið í Sandavági í nakrar dagar.

Tá Ronald og familjan eru í Føroyum, búgva tey hjá Astu og Leivi Joensen í Sandavági. Leivur er bróður Mariu, sum Ron var giftur við. Hinir brøðurnir eru Jákup Sverri Joensen, fiskifrøðingur, í Havn, og Jens Pauli Joensen, sáli, sum búði á Tinghúsvegnum í Havn.

Tann fimta apríl 1942 varð Ronald saman við umleið 300 hermonnun settur á land í Sørvági. Teir komu við troppaskipinum "Lady of Man", sum ikki fekk lagt at í Sørvági. Teir vórðu til fluttir við smærri bátum til lands. Ronald búði fyrstu tíðina í Miðvági.

24. juni 1943 giftist Ronald við Mariu Joensen, í Skúlanum, í Sandavági og flutti inn til verforeldrini í Sandavági at búgva.

Móti ársenda í 1943 fekk hann boð um at fara aftur til Onglands. Maria kom við, og tey búsettust í Oldham nærindis Manchester.

Stutt eftir var Ronald sendur víðari. Hann skuldi inn á evropeiska meginlandið. Til Hollands og Týsklands. Teir skuldu inn á meginlandið at byggja uppaftur, brýr, sum sundurskotnar vóru, og vegir, sum skuldu gerast aftur.

Ronald kom aftur til Onglands eftir krígslok, har hann gjørdist vaktarmaður í eini krígsfangalegu. Teir vóru 20 bretar, sum ansaðu 300 týskum krígsfangum.

Nakað eftir tað fluttu tey aftur til Sandavágs, har tey búðu til 1948, tá Ronald gjørdist prestur í ensku Metodistkirkjuni. Hann hevur verið prestur í Yorkshire og í Hull.

Hann arbeiddi sum prestur í Onglandi, til hann var 73 ára gamal.

Maria doyði bara 55 ára gomul í 1977. Hon liggur grivin við síðuna av foreldrum sínum í Sandavági, og Ronald vil sjálvur verða grivin har, tá hansara tíð her er farin.

Ronald hevur nakrar ferðir prædika í kirkjuni í Sandavági.

Ron er í dag 86 ára gamal. Hann býr í lítla býnum Snaith nakað innan fyri Hull. Tríggjar døtur fingu hann og Maria, og tær búgva allar í grannalagnum, sum hann tekur til. Hann eigur níggju abbabørn og tvey langabbabørn.

At Sandavágur er vakrasta stað í Føroyum, ivast Ronald Brierley ikki í. Her havi eg havt nógvar góðar løtur, og her vil eg verða lagdur at hvíla seinastu ferð, sigur Ronald Brierley.



*Ronald Brierley saman við familju, f.v.: Chris Rainforth, versonur, Ronald Brierley, yngsta dótturin Fran Rainforth, og Leivur Joensen, svágur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*